DAGSINS MEINING

Breiða grundarlagið hvarv

Í ólavsøkusrøðu síni boðaði løgmaður frá, at hann ætlaði at søkja breiðar semjur um týðandi politisk mál hesa komandi tingsetuna. Hetta ljóðaði bæði demokratiskt og skilagott. Nú er so fyrsta stóra málið á skránni nevniliga figgjarlógin fyri 2004, og breiða grundarlagið er enn ikki komið í ljósmála. Heldur er tað horvið. Báðir andstøðuleiðararnir hava verið í fjølmiðlunum og víst á, at í hesum máli verður ikki roynt at finna breiðar semjur. Lisbeth Petersen og Jóannes Eidesgaard vístu á, at tað í hinum Norðurlondunum er vanligt, at stjórnin ger semjur við partar av andstøðuni um týðandi partar av figgjarlógini. Á hendan hátt tryggjar ein sær, at figgjarlógin hevur so breiða politiska undirtøku sum møguligt. Hetta merkir so aftur, at figgjarlógin hevur breiða fólksliga undirtøku. Soleiðis fær ein eina haldgóða figgjarlóg.

Men hóast okkara nýggja stýrisskipan leggur upp til júst ein slíkan politikk í týðandi málum, so ger landsstýrið beint tvørturímóti andanum í stýrisskipanini. Hetta verður ikki bara gjørt í spurninginum um figgjarlógina. Hetta er meginreglan í øllum týðandi málum. Málini verða trumfað ígjognum løgtingið við smalast hugsandi meiriluta. Hetta er ikki gott fyri málini, ei heldur er hetta gott fyri fólkaræðið. Tað er ongantíð gott fyri fólkaræðið, at ein andstøða verður sett heilt út um alla politiska ávirkan. Men soleiðis hevur verið nú í fimm ár, og soleiðis fer ivaleyst at verða, so leingi henda borgarliga samgonga valdar í Føroyum.

Tað er mikið spell, at andstøðan soleiðis verður sett út av politiska spælinum. Hetta er ikki bara ódemokratiskt, arrogant og ódámligt. Tað er ikki bara so, at henda siðvenja gevur vánaligari loysnir, enn tær loysnir, ið breiðar semjur høvdu givið. Nei, afturat hesum kemur hetta, at gjógvin í fólkinum bara gerst breiðari og breiðari. Hesin óvikiliga meirilutapolitikkur elvir, sum vit áður hava víst á her, til eina púra óneyðuga polarisering av føroysku tjóðini. Henda polarisering verður, sum frá líður, til skaða fyri Føroya fólk og teir sum so stívrendir fremja hendan politikk mugu bera ábyrgdina av polariseringini. Enn eru stundir til at broyta hesa kósina. Samgongan eigur tí at fara til andstøðuna, nú farið verður undir at evna nýggja figgjarlóg til. Og tá má andstøðan sjálvandi eisini vísa vælvilja. Hetta hevði gagnað føroyskum politikki og hetta hevði gagnað landsins íbúgvum, sum treingja til breiðar og støðugar loysnir heldur enn smalar og óstøðugar fyribilsloysnir.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Opið bræv til Páll á Reynatúgvu, landsstýrismann, Løgtingið og Føroya Pensionistafelag

Hjalmar Joensen

Vanligt hevur verið, at allir lønmóttakarar í landinum fáa lænarhækkan annað ella triðjahvør ár.

Við hesum fylgir, at prísir og aðrar útreiðslur hjá brúkaranum so við og við hækka. Tey,ið fáa eftirløn úr landskassanum fáa eisini hesa lønarhækkan. Tó fáa fólkapensiónistarnir onki, og kann hetta ikki vera rætt!

1. januar 2000 kom nýggj fólkapensiónslóg. Hetta førdi við sær, at Helena Dam á Neystabø fór út landsstýrinum. Ein av broytingunum, (mistøkunum) varð, at nú fekk ein pensiónistur m.a. kr. 856,- minni í grundupphædd, um hesin var giftur. Eisini viðbøturnar vóru tá minni. T.v.s. at eini hjún, har bert annar fekk fólkapensión, hevði væl minni at liva fyri, enn hin staki pensiónisturin hevði.

Landsstýrismaðurin átti at fingið rætta orðingina í lógini hesum viðvíkjandi, til tað hon var áðrenn 1. januar 2000.

Inntøkumarkið hjá fólkapensiónistunum átti at verið strikað. Øll onnur eftirlønt kunnu arbeiða so mikið teim lystir uttan at verða trekt.

Nú koma so tær almennu lønarsamráðingarnar fyri. Væntandi hækka lønirnar 8-9% hesaferð. (Nakað tað sama sum seinast).

Tí áttu pensiónirnar automatiskt at hækka tað sama, og allarhelst 2 ferður tey 9%.

So Páll á Reynatúgvu, Løgtingið og Føroya Pensiónistafelag - hvat við at fara í sving fyri fólkapensiónistarnar!

Eisini biði eg allar pensiónistar taka til orðanna hesum viðvíkjandi. Sum nú er, tódnar pensiónin meir og meir í mun til hin hækkandi livikostnaðin.

Spinatfuglarnir hjá Sjúrði Skaale

Pól á Kletti
blaðmaður

Eg skilji ikki, hvat ein koyrilssmellur í Fregni (seinni í øðrum bløðum við) yvir bak Tjóðveldisfloksins og Fólkafloksins hevur við innihaldið í Skáa – leygardagsískoytisblaði Dimmalættingar – at gera.

Greinin í Fregni stóð í blaðnum síðsta vikuskifti, og nú tykist tað vera Sjúrði Skaale umráðandi í eini viðmerking til Lassa Klein, formann í landsfelagi Sjálvstýrisfloksins, at fáa skotið henda – óviðkomandi – setningin inn: »Tann, sum lesur donsk bløð, leggur til merkis, at fólk, sum skriva Skáan í Dimmalætting leygardagar, viðhvørt stjala sínar greinar. Tey umseta okkurt úr Politiken ella Berlingske, og selja tað síðan til Dimmu sum um tey hava skrivað tað sjálvi.«

Tann, sum onkuntíð tímir at lesa blaðgreinir hjá Sjúrði, varnast, at hann er skjótur at klaska eina etikett á pannuna á fólki og skriva ein ella annan tilvildarligan karakter á. Soleiðis sum Sjúrður málber seg í nevndu viðmerking – »... fólk, sum skriva Skáan« – so er talan um eitt fleirtal av fólki, sum uttan boð ella orð nápa tilfar frá øðrum. Nú eri eg sum blaðmaður á Dimmalætting settur til at taka mær av tilfarinum, sum sent verður Skáa, umframt at eg skrivi nakað sjálvur. Tessvegna havi eg hesar viðmerkingar:

Eitt kann eg vissa teg um, Sjúrður Skaale! – tey, sum skriva í Skáa eru ikki nakrir lættisoppar, og tey brýggja seg tí heldur um ikki at fáa karakterin: »Spinatfuglur« settan á ennið. (Spinatfugl kalla danir t.d. ein høvund, ella einhvønn ólærdan, sum stjelur úr verkum frá øðrum.) Hetta eru flest øll fólk við útbúgving frá hægri lærdómssetri, ella sum eru í holt við at útbúgva seg. Talan er um útbúnar journalistar, málfrøðingar, bókmentafrøðingar, samfelagsfrøðingar, fólkalívsfrøðingar, serkøn í átrúnaði, heimspeki o.s.fr. Og talan er um søgulærarar og onnur fróðarfólk, sum í mong ár hava ríkað leygardagsískoytisblað okkara. Her skrivar ein málfrøðidoktari fastan teig í blaðnum umframt tveir – annar fólkalívsfrøðingur, hin bókmentafrøðingur – sum standa á gáttini at gerast doktarar.

At fólk í ymsum skriftligum arbeiði nýta aðrar skriftligar keldur at styðja seg til, er einki óvanligt. Tí til hvørja nyttu verður arbeiðið so gjørt, um tað ikki skal koma øðrum til gagns, ið aftaná fylgja. Tað kann haraftrat verða nýtt sum ískoyti til egnan forkunnleika og menna ta vitan, ein hevur um ávíst evni. Sjálvur havi eg tað álit á tilkomnum, skrivandi fólkum, at tey eru kreativ og so mikið at sær komin, at tey ikki skriva av (umseta) greinir hjá øðrum og síðan leggja sítt egna navn til.

So, Sjúrður, tú mást nevna dømi, um eg skal trúgva tær. Og fái eg tað, verði eg noyddur at kanna, um hald er í tí. Hevur tú rætt, má mistakið í allari sakligheit rættast, so tað ikki endurtekur seg. Er talan bara um partar av greinatilfari, nýtt saman við øðrum keldutilfari, er tað í lagi, tí so er talan um egið granskingararbeiði og ikki plagiering. Góður siður er tó at at spyrja um loyvi og at vísa á kelduna, antin inni í sjálvum tekstinum, ella – um talan er um fleiri keldur – í yvirliti fyri seg.

Vísir tað seg hinvegin, at tú sigur ósatt, so verður tú noyddur standa til svars yvir fyri hesum fólkum, sum tú leggur undir at stjala.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Tað er so synd í Javnaðarflokkinum!!!

Áki Andreasen

Í oddagrein í Sosialinum týsdagin 19/09/2003 - viðgerð oddagreinskrivarin hvussu fólkaræði hevur tað - í Norðanlondum og her heima hjá okkum, hann letur ikki serliga væl at tá talan er um politiska orðaskiftið: "tónin í Føroyum er mangan harður ja, næstan hatskur.."

Tað er sjálvandi ílagi at hava eina meining um støði sum kjakast verður á, og at mæla til at støði skal verða sømiligt og sakligt - tankin er góður.

Men tað er ikki ókent at mangan er langt millum orð og gerð - tá má so sanniliga bara staðfestast tá oddagreinin er lisin.

Hatski tónin og javnaðarflokkurin...

Eftir eina rímuliga góða byrjan, fellur alt so logandi til jarðar í greinini, og alt steðgar upp. Eyðkendi javnaðarstílurin skínur ígjognum, og greinskrivarin slær fast at tann "hatski" tónin sum eyðkennir politiska orðaskifti í Føroyum "*gongur mest út yvir tey sum ikki taka undir við fullveldispolitikkinum"* og hann heldur fram "*..serstakliga gongur hetta út yvir javnaðarflokkin og út yvir fólk, ið verða hildin at hava samhuga við hesum flokki*".

Álvaratos greinskrivarin og øll sum tíma at fylgja bert eitt sindur við í politiska orðaskiftinum í Føroyum vita at tað sum er blivi sagt og skriva um fullveldisætlanina og tey sum stuðla fullveldisætlanini fyri ein stóran part als ikki er borðbart. Hvør tosaði um "krystalnáttina" í samband við politiskt orðaskiftið??, ella ein yvirskrift hjá Hans Paula Strøm: "*Tjóðin hildin fyri spott av fjølmiðlatølaranum og fólkavillaranum*" - ein grein sum leggur formann tjóðveldisfloksins undir líkt og ólíkt, ella brot úr grein hjá Katrin Dahl Jacobsen: "*Tað var tann tíð, tá Høgni var umgyrdur í allar ættir av fjarstýrdum mailskipaðum altíð-prefabrikeraðum-skriviklárum-grátifólki*" - og hildi kundi verið fram, nei einki líður Javnaðarflokkurin ella javnaðarfólk undir nøkru "hatskum" orðaskifti í Føroyum.

Tær "óseku" oddagreinirnar...

Oddagreinirnar í Sosialinum heva heldur ikki verið so tannleysar tá talan hevur verið tann "hatska" tónan - og Tjóðveldisflokkurin og tjóðveldisfólk hava verið viðgjørd við vendingum sum als ikki hoyra heima í einum orðaskifti og so slettis ikki í einari oddagrein.

Brot úr aðrari oddagrein: "*Tjóðveldisflokkurin provokerar ikki bert í landsstýrinum, hann provokerar eisini í løgtinginum*".

Í seinastu viku var yvirskriftin "Væntandi fólkaræði" og enn ein oddagrein sum viðgjørdi Tjóðveldisflokkin, har oddagreinin legði ósannindi og pástandi fyri dagin: "*..ein veikleika í Tjóðveldisflokkinum og vantandi fólkaræði í flokkinum.*" og víðari "*..at fólk av røttum kunnu seta spurnartekin við fólkaræðið í Tjóðveldisflokkinum*". Jú, Sosialurin kann av sonnum gera sítt til fyri at draga áðurumtalaða støði niður.

Sosialurin vil sleppa at viðgera Tjóðveldisflokkin og innanhýsis viðurskiftið í flokkinum; hví veit eg ikki, tað má verða tí at skili í Javnaðarflokkinum er so framúr.....

Javnaðarflokkurin í sjónligari kreppu

Hetta at Sosialurin javnt og samt vil gera fullveldispolitikki og viljan at klára seg sjálvan til eina brotsgerð, og aliment taka synd í Javnaðarflokkinum og javnaðarveljarum, vísir ein flokk í sjónligari kreppu, sum ikki enn hevur megna at endurnýggja seg, vit minnast "Fólkið fyrst" til seinasta løgtingsval - eitt herróp sum var kopierað av heimasíðuni hjá danska javnaðarflokkinum, ikki ein gang eitt "valslogan" kann flokkurin framleiða; vit minnast eisini sjabbi um eina alheims "javnaðarfamilju" - tað bráðtagnaði tá Javnaðarflokkurin í Bretlandi fór í kríggj móti Irak vegna hópoyðingarvápn - sum ikki eru funnin enn!

So skuldi ein sviði koma at hjálpa Føroya Javnaðarflokki - tað kunngjørdi formaður Javnaðarfloksins fyri opnari mikrofon....hví kann slíkt ikki viðgerast í einari ella fleiri oddagreinum í Sosialinum?? Ella hvussu var tað við stríðnum millum flokkin og Gerhard Lognberg???

Øll vita at áralanga atfinningin móti Tjóðveldisflokkinum einans skal fjala útyvir ein Javnaðarflokk, sum hevur trupuleikar á øllum økjum, bæði tá tað snýr seg um sakligar politikarar, ein politik sum kann standa seg í gerandiskjakinum, ein politikk á ríkisrættarliga økinum o.s.fr.

Javnaðarflokkurin skuldi sett seg niður og sett sær spurningin "Hat gera vit fyri at fáa ávirkan"??, ístaðin fyri blanda alt saman: persónar, fakfeløg, verkføll, politkk og hvat veit eg.

Tá vildi tað verið nemmari at veri Javnaðarflokkur og javnaðarfólk og so var tað heldur ikki so synd í tykkum, tá "hatska" orðaskiftið leikar á.

So varð spakin settur í

Hergeir Nielsen

Leingi er tað, ið væl skal vera, er so mangan sagt, men tósdagurin 18. sept 2003 gjørdist so minniligi dagurin, har farið varð undir eina størri almenna bygging í útjaðaranum av landinum.

Talan er um eitt stórmál í okkara verð, sum her suðuri búgva, og serliga um eitt stórmál fyri ungdómin, mentanina og vakstrarmøguleikarnar í Suðuroynni.

Spakin verður nú settur í, og Miðnámskúlin í Suðuroy kemur at liggja á Hamrabø vesturi við Vatnið í Vági. Ein 5 ára gomul ætlan er komin undir land.

Skúlin er ætlaður 150 næmingum, kemur at kosta 45 mió.kr., og stendur vónandi klárur at taka í nýtslu um eini 3 ár.

Eitt meginbókasavn fyri alla Suðuroynna verður bygt upp í skúlan, og fáa vit suðringar so har allar tær tænastur, ið andi fer hetta at gera sítt til, at tey venda heimaaftur, tá ið tey einafer seta búgv.

Ein partur av økismenningini er komin undir land við einum útbúgvingarstovni av hesum slag, men nógv liggur á, eina mest hvat arbeiðsplássum til tey ungu viðvíkur. Tí verður ikki givist á hondum, men støðugt virka fyri, at vit eisini røkka ábótum innan henda setning okkara.

Føroyska samfelagið savnar seg saman í færri og størri eindir, og kemur hesin felags stovnur okkara her suðuri so eisini at vera eitt gott íkast til at eitt tílíkt savn er ætlað at veita borgarum sínum.

Ætlanin er at byggja nøkur fá meginbókasøvn í landinum, og savnið í Vági verður so tað fyrsta av sínum slag. Ein burturav týðandi mentanarfongur fyri útjaðaran, ætlaður øllum borgarum í Suðuroynni.

Samgongan raðfestir skúlabygging høgt, og fer eisini undir at byggja aðrar skúlar á miðnámsstigi aðrastaðni í landinum.

Hóast tørvurin er stórur fleiri staðni, var hildið rættast at byrja í Suðuroynni, og nú spakin verður settur í, eru vit sera væl nøgd við ta samtykt, ið løgtingið gjørdi í vár.

Ungdóminum í Suðuroynni gevast nú munabetri møguleikar fyri at støðast longri í heimligum umhvørvi, og vónandi fer hetta at gera sítt til, at tey venda heimaaftur, tá ið tey einafer seta búgv.

Ein partur av økismenningini er komin undir land við einum útbúgvingarstovni av hesum slag, men nógv liggur á, eina mest hvat arbeiðsplássum til tey ungu viðvíkur. Tí verður ikki givist á hondum, men støðugt virka fyri, at vit eisini røkka ábótum innan henda setning okkara.

Føroyska samfelagið savnar seg saman í færri og størri eindir, og kemur hesin felags stovnur okkara her suðuri so eisini at vera eitt gott íkast til at menna medvit okkara um at standa saman og finna felags loysnir.

Slóðað er nú fyri, at lokalu myndugleikarnir geva teirra íkast til, at ungdómur kring landið kann savnast her um okkara leiðir í útbúgvingarørindum.

Góðir figgingarmøguleikar eru fyri at byggja næmingaíbúðir í tilknýti til skúlan, soleiðis at ungdómur aðrastaðni kann støðast her undir sera góðum, tryggum og mennandi umstøðum, áðrenn tey leita sær burtur í víðari lestrarørindum.

Suðuroynni tørvar eitt mentanarligt umhvørvið, sum ein skúli av hesum slag kann menna og geva íblástur til. Nú karmarnir eru lagdir til rættis, vóna vit at røttu kreftirnar leita fram at teimum og fylla teir út.

Almenningurin í Føroyum hyggið her!

Hans Birgir Hansen
Ps. Samfelagsrevsarin úr Havnini

Eg tráði eftir at galdandi lóggávur, skipanir, dagligar mannagongdir, kunn- og reglugerðir vera endurskoðaðar og dagførdar innan alt skrivstovuveldi øllum teim ráðandi og útinnandi yvir-vøldir og vøldir!

Tað sama er galdandi øll stór og smápartafeløg og innan fyri frítíðar- og ítróttarfelagsskapir, frikirkjur, fólkakirkjur, samkomur og teir loyniligu felagsskapir, klubbar, embætisfólkum, handilsfólkum v.fl.!

Eg eri fyri at allar politiskar (restriktiónir) avmarkingar vera fingnar av vegnum, so øll fáa liva og virka frítt við fullum frælsum, rættindum og privatlívsfriðin, øll skulu tryggja ímóti óviðkomandi uppileggjan!

Tað merkir at øll diskrimineran, stættarmunur, skal fyribeinast, eins og allur framihjárættindir, til arbeiðir, størv, lestrar- og lærumøguleikar og skipaður familju-, vina- og kenningarpolitikkur í Føroyum!

Eg eri hart ímóti tá ið arbeiðs-, starvsfólki, telefonistar, føra seg fram sum vóru tey heima hjá sær sjálvum, ið ikki hava rætt at draga sínar heimligu trupulleikar á arbeiðsplássi, ið ein vil finnast harðliga at.

Tað eiga arbeiðsgevarar, arbeiðstakarar, ið hava fólk í arbeiði, starvi, at gera teim nógv greitt, at tey skulu gevast við at føra privatar samtalur í arbeiðstíð og fáast við telduspøl í arbeiðstíðini við fullari løn! Eg haldi at slík avgreiðslu og starvsfólk, telefonistar, skuldu fingið í dag greið boð, at gevast tey ikki við slíkum, kunnu tey fáa uppsøgnina, og søkjast kann eftir nýggjum arbeiðs- og starvsfólki í fjølmiðlunum!

Tað hevur stóran týdning at fáa tillaga alt fjøltáttað virksemi at tæna viðskiftafólki og ikki avgreiðslu og starvsfólki, telefonistum, tí hesi seinri skapa viðskiftafólki óneyðugar trupulleikar ið ein upplivir!

Eg kann vísa á týdningin at fáa skipað nattúrligu frágongd av eldri starvsfelagum og náttúrligu tilgongd av yngri starvsfelagum og fáa skipa javnvágina, og skipa samskifti og samstarvi báðar vegir.

Tað at fáa skunda undir øllum áðurnevndu er avgerandi neyðugt at koma tí støðugt vaksandi stagnatión til lívs við breiðir seg tá við øll steðga up, tá høvdini á øllum ættarliðum eru farin út av lagi ídag!

Eg síggi undirgangin, ragnaroki, sinnissjúkuna, gerast fylgjan og anarki, tá ið øll vera sett hvør upp ímóti øðrum, tey sterku og veiku í samfelagshøpi, vit síggja innanfyri og uttan fyri etableraðu skipanir!

Tað er ein harður kostur at vera landskend býarmynd í Havnini í dag og kvøld ikki fær frið fyri óviðkomandi fólki, ið sýna einum veruligan hatur, óndskap, øvundsjúku, uttan nakra sum helst grund

Eg havi ikki nakra skyld, tá fólk edrúulig og sjónliga ávirkaði ikki kunnu klára upp við seg sjálvi og egni familju, og vinir, kenningar, út í øllum kommunum, tá hesi rekast fyri vág og vind í Havnini!